TILTØK

FØÐINGAR

8. juni fingu Sigga Eliasen og Thorvald Thomsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

9. juni fingu Ruth og Kári Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

14. juni fingu Linda Lauritsen og Birgir Hansen, Sørvágur, tvíburar – dreingir. Tann eini var 45 cm. langur og vigaði 2250, hin var 45 cm. langur og vigaði 2150 gr.

17. juni fingu Marjun og Høgni Neshamar, Argir, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3490 gr.

18. juni fingu Magna L. Joensen og Mouritz L. Mohr, Fuglafjørður, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2850 gr.

18. juni fingu Bergtóra Justinussen og Jimmy Larsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3100 gr.

19. juni fingu Gudny Heinesen og Jacob Edmund Jacobsen, Skála, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4340 gr.

20. juni fingu Jendis Gærdbo og Bjarni Kyster, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3130 gr.

14. juni fingu Siri Reinert Petersen og Rógvi Hansen, Fredericia ein son. Han var 52 cm. langur og vigaði 3600 gr.

ANDLÁT

13. juni
Hans Nicodemussen, av Sandi, 92 ár.

14. juni
Pól Jensen, av Sandi, vanliga nevndur Pól hjá Marini, 81 ár.

18. juni
Martin Andreasen, Tórshavn, 77 ár.
Eyðun Dahl Joensen, úr Vági, 44 ár.

PRÓGV

Kristianna Larsen á Lofti hevur á Føroya Handilsskúla lokið prógv sum Merkonom við linjuni Starvsfólkamenning.

Katrin Jørgensen, Miðvágur, hevur fingið prógv sum musikklærari frá Tónlistarskúlanum í Reykjavík.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 22. juni: Andreas Petersen, tlf. 441086
Sunnudagin 23. juni: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

Gudstænastur
4. sunnud. eftir Trinitatis
Fuglafjørður: kl. 11,
Hellur: kl. 17, altarg., Uni Næs
Mikladalur: kl. 11, lestur
Viðareiði: kl. 11, lestur
Christianskirkjan: kl. 11, Hans Eiler Hammer
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Argja kirkja: kl. 11, Bergur D. Joensen
Kollafjørður: kl. 11,
Kvívík: kl. 12, Marjun Bæk
Haldarsvík: kl. 11,
Tjørnuvík: kl. 12, Inga Poulsen Dam
Friðrikskirkjan: kl. 11, Martin R. Jacobsen
Havnar kirkja: kl. 11, Sverri Steinhólm
Kaldbak: kl. 12, Sonja Klein
Hvítanes: kl. 11, Henning Nielsen
Eiði: kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 mesa Emil Olsen
Skála: kl. 11, altarg., Jógvan Friðriksson
Hósvík: kl. 11, Inga Poulsen Dam
Hov: kl. 11,
Hvalba: kl. 12.30.Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina
Sandvík: kl. 14 Ólavur Ramussen. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina,
Skálavík: kl. 12, Jákup R. Hansen
Sandavágur: kl. 11, David Johannesen, Danskt kirkjukór syngur
Porkeri: kl. 12. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina
Sumba: kl. 17, Marianne Telling
Húsa kirkja: kl. 11, lestur
Rituvík: kl. 11, Meinhard Bjartalíð

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa við Michael Bradley í Mariukirkjuni.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 og 18 Møti, majorarnir Knut og Turid Gamst tala. Kl. 17.30 Bøn.

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru vælkomin. Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Sunnudagin kl. 11 Morgungudstænasta við Øivind Augland. Kl. 14 Sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla. Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

Meinigheitshúsið, Tórshavn
Sunnukvøldið kl. 18 Møti – útsendan av Maluni og Hera Kjærbo, Argjakórið syngur.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 18 Sang- og vitnileta.

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13.00

Vestmanna Missiónshús
Sunnudagin kl. 19 Møti við Magna Christiansen o.ø.

Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 18 Møti við Bíbliuringinum í Leirvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Fríggjakvøldið kl. 20.30, vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi, luttøka úr skopun.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Tine Jalk.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við hjúnarbólkinum. Barnamøti kl. 11. Vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

Lívsins Orð
Møti við breyðbróting verður sunnudagin kl. 10.30 og evangel. møti verður sunnudagin kl. 17. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnukvøldið kl. 18 Møti og kl. 21 Ungdómsmøti við Finn Johannesen. Evni er: »Á bíbliuskúla«.

Soli Deo Gloria
Sunnudagin kl. 18 Møti. Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.

Aglow, Klaksvík
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 22. juni kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið í Skopun
Í kvøld kl. 20 Lovsongsmøti. Sunnudagsin kl. 17.30 Lovsangur, kl. 18 Møti.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur, um viðrar.

Frelsunarherurin, Vágur
Leygardagin kl. 19 Møti, major Knut Gamst talar. (Einki møti sunnudagin). Øll eru vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

BRÚDLEYP

Mikudagin 19. juni *giftast* í prestagarðinum í Fuglafirði Ranvør Wolles úr Klaksvík og Páll Isholm úr Havn, búsitandi í Syðrugotu.

Í dag, 22. juni kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Anni Debess og Harry Benjaminsen. Veitslan verður á Svangaskarði kl. 19.00.

Í dag, 22. juni kl. 14.00 giftast í Skála kirkju Barbara Sjúrðadóttir Norðbú og Don Joensen. Veitsla verður hildin í bygdarsalinum kl. 19.00 fyri innbodnum. Vælkomst verður eftir kl. 22.00.

Í dag, 22. juni kl. 13.00 giftast í Ebenezer Súsanna á Dul, Argir og Hallur Thomsen, Hoyvík. Eftir vígsluna verður reseptión. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19 fyri innbodnum.

Í dag, 22. juni kl. 16.00 giftast í Dómkirkjuni Elsebeth Andreassen og Heri Joensen, bæði úr Tórshavn. Veitslan verður í Pálsstovu kl. 19.00 fyri innbodnum.

Í dag, 22. juni kl. 16.00 giftast í Berufjarðar kirkju í Íslandi Karin Hammer og Sigurður Eiriksson í Svínaum. Tey, ið vilja gleða brúðarparið eru vælkomin inn á gólvið í Svínaum 6. juli kl. 20.00.

Í dag, 22. juni kl. 17.00 giftast í Oyndarfjarða kirkju Anna Louisa Hansen, Skálafjørður og Steffan Gaard, Oyndarfjørður. Opið hús verður eftir kl. 19.00 í Kongshavnar kvinnufelagshúsinum á Glyvrum.

Leygardagin 29. juni kl. 14.00 giftast í Húsa kirkju Hannebeth Joensen og Magni Garðalið, Húsar. Døguðin verður hildin fyri innbodnum. Vælkomst verður í bygdarhúsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at verða við at gleða brúðarparið kunnu ringja á tlf. 456603, 214104 ella 214225 áðrenn 24. juni.

Leygardagin 29. juni kl. 15.00 giftast í Skt. Nicolei Kirke Trine Norup Andersen, Sønderborg og Dia Lamhauge, Streymnes. Veitslan verður hildin á Australia Quality Hotel, Dæmningen 6, 7100 Vejle.

Leygardagin 6. juli kl. 14.30 giftast í Býráðssalinum í Tórshavn, Gudny Højgaard, Kollafjørður og Brian Rasmussen, Kaldbak. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu boða frá á tlf. 316797 ella 421137 ella bri-ras@post.olivant.fo í seinasta lagi 23. juni.

Leygardagin 6. juli kl. 13.00 giftast í Ebenezer Marta Wang, Miðvágur og Ingálvur av Reyni Jøkladal, Hoyvík. Drekkamuður verður aftaná vígsluna til tey, ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið. Veitslan verður á Hotel Føroyum fyri innbodnum kl. 18.00.

Leygardagin 13. juli giftast Gudny Rasmussen, Oyndarfjørður, og Palli Vang, Fuglafjørður. Vígslan verður í Oyndarfjarðar kirkju kl. 15.00. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, kunnu ringja á tlf. 445152 ella 226415. Eisini ber til at siga frá á telduposti: palli@kallnet.fo. Seinasta freist er 1. juli.

Leygardagin 13. juli kl. 13.00 giftast í Vesturkirkjuni Oddvør Johannesen og Bjarni Mohr. Dagurin verður hildin á Stykkinum hjá Karlu og Poul Danielsen. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu ringja á tlf. 322299, 313112 ella 421318 í seinasta lagi 1. juli.

Sunnudagin 14. juli kl. 13.30 giftast í Býráðssalinum í Havn Jónhild Æðustein Poulsen, Tórshavn og Ruben Maarbjerg Busk, Sabro. Brúdleypið verður fyri innbodnum á Hotel Hafnia. Opið hús verður 15. juli, Undir Gráasteini 64, aftaná kl. 15.00.

Fríggjadagin 19. juli giftast í Gøtu kirkju Heidi Jacobsen, Syðrugøta og Jan Heinesen, Norðragøta. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja vera við til at hátíðarhalda henda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. 441627 ella 441512.

Leygardagin 20. juli kl. 16.00 giftast í Viðareiðis kirkju Rudi Heinesen, Viðareiði og Teitur Samuelsen, Tórshavn. Veitslan verður á Hotel Norð á Viðareiði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, vinarliga boði frá á tlf. 0045 32886790 ella 0045 61706790 innan 12. juli.

Leygardagin 20. juli kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Leila Neshamar, Fuglafjørður og Bogi Meinhardson Lamhauge, Glyvrar. Veitslan verður í Mentunarhúsinum í Fuglafirði kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu ringja á tlf. 444431, 444443 ella 447902 innan 8. juli.

Leygardagin 27. juli kl. 15.00 giftast í Dómkirkjuni í Tórshavn Ann Joan Nicolajsen úr Skopun og Magni Reinert úr Hoyvík. Vælkomst verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, biðjast ringja tlf. 312962, 421531 ella 258761 í seinasta lagi 8. juli.

Leygardagin 3. august kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Maibritt Johannesen og Andrass Ásbjørnsson Midjord, bæði av Argjum. Døguðin verður fyri innbodnum. Veitslan verður í Róðrarneystinum á Argjum kl. 20.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma í veitsluna, verða biðin um at siga frá áðrenn 12. juli á tlf. 310039.

Leygardagin 3. august kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Arnleyð Krosslá og Hans Jacob W. Hjelm, Vágur. Veitslan verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið ynskja at vera við at gleða brúðarparið kunnu ringja á tlf. 373357, 373207 ella 373094 áðrenn 15. juli.

Leygardagin 10. august kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Maria Hansen, Tórshavn og Eyðun Dalsgarð, Argir. Dagurin verður hildin í Pálsstovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, kunnu ringja á tlf. 315205 ella 315470 í seinasta lagi 25. juli.

Leygardagin 10. august kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Hallur Knudsen, Saltangará og Ragnhild Jensen, Sandur. Veitslan verður í B68-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá áðrenn 25. juli á tlf. 448655.

TILTØK

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bleðini eru til taks.
Mánadagin 24. juni
kl. 10-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bokkspæl, dart og onnur spøl
Tilmelding til døgurðan mikudagin, tlf. 316491
Týsdagin 25. juni
kl. 10-12 Vit baka til ólavsøku
kl. 16.00 Vitjan úr Belgiu
Mikudagin 26. juni
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bleðunum
Hósdagin 27. juni
kl. 10-17 Opið hús
Fríggjadagin 28. juni
kl. 10-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – Náttartúrur
Leygardagin 22. juni verður gingið: Akraberg-Vág. Farið verður av Farstøðini við Smyrli kl. 20 og norður aftur sunnumorgun. Túrurin er tungur. Havið heit og góð gongukleði og ein góðan mapkakka við. Tilmelding.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaðí er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvønn leygardag kl. 17.00 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 15.00.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924, e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Hvør tann, ið tí vil kennast við meg fyri monnum, hann vil eisini eg kennast við fyri faðir mínum!
Matt. 10,32

Hesi orðini segði Jesus, tá hann sendi ápostlarnar út at prædika gleðiboðskapin fyri heiminum. Vit eru bæði sum kirkja og einstaklingar send út at vitna um Jesus og at kennast við hann. Tað er kanska lættari at kennast við Jesus og boðskap hansara í mannfjøld, enn tá vit standa framman fyri einstaklingum. Men vit eru sum kristin sett at tala sannleika og at hata lygn og ósannindi. Vit eiga ikki at ganga eftir slatri hjá menniskjum; men eiga at verða við tí góða orðinum. Vit eru sannleikans og kærleikans tænarar. Og til hesa tænastu eru vit send av Jesusi. Hesa uppgávu hava vit menniskju. Tað eru ikki vit, sum hava útvalt okkum sjálv; men Jesus hevur útvalt okkum til tænastu í hinum kristna felagsskapinum. Vit eru sett at játta og vitna. Og um so skuldi verið, eiga vit at líða fyri sannleikans søk.

Hetta eru korini ein Jesu lærusveinur arbeiðir undir. Tað er so nógv í heiminum, sum vil hava okkum at avnokta og svíkja Jesus og kall okkara. Tað er so nógv, ið vil draga burtur frá Jesusi og trúnni á hann.

Lívið er eitt stríð millum Gud og hin ónda. Í hesum stríði skulu vit standa við, at vit eru Jesu lærusveinar. Vit eru sett at halda fast við, at vit eru sannleikans og kærleikans tænarar. Gloym tí ikki at játta, tá Gud krevur játtan og vitnisburð av tær millum manna. Bara soleiðis vil Jesus kennast við teg á evsta degi!

Amen.

David Johannesen

70 ÁR

Í dag, 22. juni fyllir Jutta Lognberg, Skopun, 70 ár. Dagurin verður hildin í kvøld í Samljóð í Skopun kl. 19.00.

Kundarøktari til Kall

SANSIR TEL 355 355

Av tí at ein av okkara kundarøktarna fer undir hægri lestur, verður søkt eftir evnaríkum og dugnaligum fólki til kundarøktina.

Er tú ágrýtin, góður at samstarva við og kanst arbeiða sjálvstøðugt, so er tað kanska tær, vit hava brúk fyri.

Arbeiðsuppgávurnar vera í høvuðsheitum
- søla til privatkundar
- hjálp og vegleiðing til kundar
- skráseting og avstemman av debitorum
- tilsetan av kundatænastum
- o.a. fyrifallandi skrivstovuarbeiði

Vit hugsa okkum, at tú hevur royndir við at arbeiða við kundum. Arbeiðið hevur skiftandi arbeiðstíðir, og neyðugt er, at tú kanst arbeiða um kvøldið.

Vit kunna bjóða eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, har fólk hava tikið á seg at vera nýskapandi. Tú fært góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning á einum arbeiðsplássi, ið vil vaksa seg stórt í kunningarmeldrinum.

Lønin verður ásett eftir førleika og royndum. Starvið verður sett skjótast tilber.

Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 8. juli 2002. Allar umsóknir vera viðgjørdar í trúnaði.

Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú ringja til Henny á Líknargøtu á telefon 202052.

Endamálið hjá Kalli er at vera mest nýskapandi á føroyska marknaðinum og altíð veita ta bestu tænastuna fyri ein góðan prís.

kall

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21 · Postrúm 3299 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo

Orðið er títt